Televarpið
Fleiri rásir - einki roks

# Fullur av lygn

Á Kanal 5 mikukvøldið kl. 20.00



*Jim Carrey er fullur av lygn í hesum skemtifilminum frá 1997*

Sakførarin Fletcher Reede er púra burtur í arbeiði sínum. Hann hevur halgað lív sítt til at stýra sannleikanum til egnan fyrimun, so at hann vinnur eitt og hvørt rættarmál. Hesin skeivi hugburðurin hevur kostað honum hjúnabandið, konan Audrey er farin frá honum. Hendan hendingin er als ikki ein fyrimunur, tá talan er um viðurskiftini millum Fletcher og son hansara Max. Fletcher hevur lovað Max fleiri ferðir, at hann kemur til føðingardagin hjá tí skjótt átta ára gamla Max. Men eitt týðandi mál á arbeiðinum kemur tvørt fyri, so Fletcher ringir til Audrey og umber seg so vánaliga, at Max eisini sær, at talan er um eina tunna og vánaliga umbering. So, tá Max blæsur ljósini á lagkøkuni ynskir hann sær nakað heilt serligt. Hann ynskir sær, at pápi sín ikki skal vera førur fyri at lúgva eina lygn í 24 tímar. Og brádliga, so stendur Fletcher illa í tí. Hann fær ikki logið tí minstu lygnina. Afturat hesum uppdagar Fletcher, at hann heldur ikki klárar at halda sær við at siga sína erligu meining um stjórarnar á sakførarafyritøkuni, har hann arbeiðir. Fletcher er í øðrum orðum noyddur at vara sín munn, ímeðan hann stríðist fyri sínum yrki, samstundis sum hann roynir at forða Audrey í at flyta til Boston saman við Max.



*Max ynskir sær nakað heilt serligt, tá hann blæsur ljósini á lagkøkuni á átta ára føðingardegnum*

# Elvis: That´s The Way It Is

Á TCM mánakvøldið kl. 21.40



*Elvis Presley í hesi endurútgávuni av filminum frá 1970 Elvis: That´s The Way It Is*







Í hesum dokumentarfilminum frá 1970 síggja vit Elvis Presley í einum lagnutungum tíðarskeiði. Eftir eina 10 ára fráveru roynir Elvis av álvara at fáa gongd aftur á pallframførslur sínar. Tvey ár frammanundan gjørdi Kongurin eina minni væl eydnaða roynd at trína inn á tónleikapallin í tí sjónvarpaðu sendingini, "´68 Comeback Special". Nú var Memphis-legendan sinnað at broyta framførslustíl við at leggja seg eftir at framføra millum høvuðsnøvnini í stóra undirhaldsbýnum Las Vegas. Filmurin fylgir gongdini, frá venjing til pall, við upptøkum frá teimum bestu framførslunum yvir seks kvøld. Upptøkurnar frá venjingunum, ið eru fleiri í hesi serútgávuni av filminum, vísa veruliga hvussu gott orksetrið hjá Elvis var. Og á palli sær mann ein væl upplagdan Elvis, ið leggur fyri við "That´s All Right", seinni fer hann í góðum hýri undir at tulka tvey løg hjá Ray Charles. Denis Saunders hevur gjørt filmin í 1970. Í 2000 kom so hendan serútgávan.

## FILMSTEIGURIN

# Luther: Her standi eg, eg kann einki annað

Valdið hjá katólsku kirkjuni er vorðið til eina sanna pengamaskinu. Og gudsóttandi borgarar gjalda – fyri seg sjálvar, fyri børn síni, og enn tá fyri deyðu foreldur síni.

– Men tað hjálpir einki, er tað ein maður, ið sigur. – Tí Gud fyrigevur honum, ið angrar, uttan gjald. Navn hansara er Martin Luther, og hann er við at undirgrava pengamaskinuna hjá Pávanum og ger seg til fígginda kirkjunnar. Trúbótarinnar Evropa er fult av stríðandi, valdsmiklum fúrstum, ið føra herar aftur og fram eftir landakortinum, men veruliga kollveltingin verður framd av einum munki, ið ikki sær nakað stað í Bíbliuni, at Pávin skal vera kongur á jørð. Fantastiska lagna hansara verður lýst í filminum »Luther« við Joseph Fiennes í høvuðsleiklutinum. Sir Peter Ustinov spælir her sín lívs størsta leiklut sum verji Luther, Frederik av Sachsen, Kurfúrsti.









Frumsýning

Fríggjadagin 22.10. kl. 20[00] Fríggjadagin 22.10. kl. 22[45]
Leygardagin 23.10. kl. 20[00] Leygardagin 23.10. kl. 22[45]
Sunnudagin 24.10. kl. 19[30] Sunnudagin 24.10. kl. 22[15]

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**

**HAVNAR BIO**
P Tlf. 31 19 56 P
www.bio.fo




Fríggjadagin 22.10. kl. 18[30] Leygardagin 23.10. kl. 18[30]
Sunnudagin 24.10. kl. 20[00]




Fríggjadagin 22.10. kl. 21[15] Leygardagin 23.10. kl. 21[15]
Sunnudagin 24.10. kl. 22[45]




Fríggjadagin 22.10. kl. 23[30] Leygardagin 23.10. kl. 23[30]
Sunnudagin 24.10. kl. 17[45]




Fríggjadagin 22.10. kl. 18[00] Leygardagin 23.10. kl. 18[00]
Sunnudagin 24.10. kl. 17[30]